Fylgiskjal 5

Armgarð Weihe

Fra: YF-Stýrið <yf@yf.fo>
Sendt: 8. november 2022 09:45
Til: Mentamálaráðið
Emne: Bókasavnslóg til hoyringar

Góðu tit

Yrkisfelagið Miðnám hevur nakrar viðmerkingar til hetta:
1. Bókasøvnini á miðnámsskúlunum verða ikki nevnd í álitinum og tí hava vit trupult við at skilja, at niðurstøður kunnu gerast um hvussu hesi verða skipað í lóg, tá einki kanningargrundarlag fyriliggur.
2. Vit eru sera stúrin um, tað sum stendur í §11, stk 3 - at skúlabókasøvn kunnu skipast saman við øðrum bókasøvnum. Hetta má ikki gera seg galdandi á miðnámsskúlaøkinum, tí bókavørarnir hjá okkum eru miðnámsskúlalærarar, sum kenna tann tørvin næmingarnir hava í mun til at læna bøkur til uppgávur á miðnámsskúlastigi.

Tískil halda vit, at tað er neyðugt, at kanna hetta nærri í samstarvi við bókavørarnar á okkara øki, áðrenn lógin verður endalig. Í álitinum er hædd ikki tikin fyri okkara bókasøvnum, og tískil hava vit trupult við at síggja hvussu hetta álitið kann brúkast til niðurstøður um bókasøvnini á miðnámsskúlunum.

Vinaliga
Vegna Yrkisfelagið Miðnám
Birna Heinesen, forkvinna

--
Yrkisfelagið Miðnám
Varðagøta 8
100 Tórshavn
Tlf. 250469
www.yf.fo